# – Best fyri Vinnuhúsið um eg fari

**Vilhelm M. Johannesen sigur, at hann ikki vil at eitt mál um hansara persón skal skaða Vinnuhúsið og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Og tí hevur hann avgjørt at siga seg frá sum formann**



FORMANSSKIFTI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Hósdagin boðaði Vilhelm M. Johannesen nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag frá, at hann hevði avgjørt at siga seg frá sum formann í felagnum.

– Eg ynski ikki at ósemjan, sum hevur verið í Handverksmeistarafelagnum skal geva Føroya Arbeiðsgevarafelag og Vinnuhúsinum trupulleikar, og tí velji eg at fara, sigur fráfarni formaðurin.

– Ein feilur er hendur viðvíkjandi fundarpengum í øll hesi árini, og honum taki eg ábyrgd av. Men tá persónligar ósemjur nú eru við til at blása eitt avklárað mál upp, so velji eg at fara. Eg kann ikki liva við, at tað, eg havi barst fyri at byggja upp tekur skaða av einari ósemju um mín persón, sigur Vilhelm M. Johannesen í tíðindaskrivi, sum vit hava fingið frá Vinnuhúsinum.

Vilhelm M. Johannesen kom í nevndina í Føroya Arbeiðsgevarafelag í 1996, tá Føroya Handverksmeistarafelag valdi at leggja saman við Arbeiðsgevarafelagnum. Í 1997 tók hann við sum formaður eftir at Jógvan Vágsheyg legði frá sær, og hann hevur røkt formansstarvið fram til ígjár.

– Eg havi verið við til at samla vinnufeløgini undir einum taki, og vit hava bygt Vinnuhúsið upp til eitt munadygt málgagn fyri vinnuna. Og vit hava júst keypt eini hús, sum kunnu gerast ein virðiligur karmur um framhaldandi menning av Vinnuhúsinum. Eg føli tí ikki at mín partur liggur eftir, nú eg velji at fara frá sum formaður, sigur Vilhelm M. Johannesen.

Stjórin í Vinnuhúsinum, Jan Mortensen, váttar, at umsitingin í 2003 varnaðist ein feil í uppgerðini av fundarpengum fyri tey tvey undanfarnu árini. Hesin feilur var rættaður fyrst í desember og tá var slætt borð.

## Vilhelm M. Johannesen frá sum formaður í FAG

**Í gjár valdi Vilhelm M. Johannesen at siga seg frá sum formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag. Nýggjur formaður er Kristoffur Laksá**

FORMANSSKIFTI
*Tíðindaskriv*

Nevndin í Arbeiðsgevarafelagnum hevur tikið avgerð hansara til eftirtektar, og næstformaður felagsins Kristoffur Laksá verður virkandi formaður fram til komandi aðalfund.

– Nevndin í Arbeiðsgevarafelagnum ynskir samstundis at takka Vilhelm M. Johannesen fyri tey sjey árini, hann hevur verið formaður, og fyri tey 25 árini har hann hevur verið virkin sum nevndarlimur í bæði Havnar- og Føroya Handverksmeistarafelag, sigur Kristoffur Laksá, virkandi formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

# Sirkus í Føroyum

**Næstu dagarnar vitjar Cirkus Arena í Føroyum við framførslum á bygd og bý**

SIRKUS
*Eirikur Lindenskov*

Í morgin verður sirkus í Runavík. Tað er Cirkus Arena, ið vitjar í Føroyum, og fyrsta framførslan hjá teimum verðurí Runavík í dag, leygardagin kl 16. Tey fara eisini at hava framførslur í Havn sunnudagin, í Trongisvági mánadagin og í Klaksvík týsdagin.

– Framførslan í Føroyum hevur mangt spennandi at bjóða – og talan er um artistarí á hægsta stigi, sigur Christian Warrer, sum er pressustjóri hjá Cirkus Arena. – Har verður bæði »gys og spænding«, men fyrst av øllum nógv at grína eftir, sigur hann.

Fyri yngru áskoðararnar er tað ein stór uppliving at hitta franska heimsmeistaran í BMX freestyl, Stephan Curaudeau. Hann er til reiðar við eini sera spennandi framførslu á lítlum súkklum.

Samson – alias Luka Odhiambo – varð føddur í ein lítlum afrikanskum bý í West Kenya. Síðani hann sum 19 ára gamal steig fyrstu fetini í showbusiness, hevur hann hugtikið fólk kring allan heimin.. Eitt nú kann nevnast, at hann í 1996 og 1997 var ein partur av »The Greatest Show On Earth« í Ringling Bros and Barum & Bailey Circus.

### Einki sirkus uttan klovn

Sjálvsagt verður nógv klovnarí eisini á skránni. Martino og Co er heitið á donsku klovna duoini, sum eftur hevur funnið fram skemntið til ársins show. Ballónaklovnurin Larna er klárur at seta fulla fer á flennivøddarnar, og Alexander Arli fer at vísa ein heilt nýggjan hátt at nýta stigan. Italski repriseklovnurin Jimmy hevur á heilt serligan hátt megnað at skapa sær eina karrieru í teimum stóru evropisku sirkusunum.

Framførslan býður eisini upp á ekvilibristiska fótjonglering, eitt nummar, sum ferð eftir ferð tekur áskoðarar á bóli. Hulla-hop fyribrigdið Navratil vísir, hvussu tú kanst hóreiggja tær við keyglum í luftini.

Nú mundu vit gloymt Pjerrot, júmenn Pjerrot er sjálvandi við í framførsluni saman við syngjandi sirkusstjóranum Benny berdino, ið sum siðvenja er leiðir áskoðararnar gjøgnum framførsluna.



# ítróttur

Nr. 26 • leygardagur • 7. februar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Nú verður stríðsval

**Í hálvgum trettandi tíma vórðu boð send til FSF-skrivstovuna um, at Dánjal Andreasen ikki verður einasta valevni til formanssessin**

FSF-STRÍÐ
*Jákup Mørk*



*Í seinastu løtu varð Frithleif Olsen úr Rituvík skotin upp sum formansevni til komandi FSF-aðalfundin*

Sum eitt hitt heitasta nýggja valevnið á løgtingsvalinum herfyri, tóktist Frithleif Olsen úr Rituvík at hava sett kósina móti Løgtingshúsinum. Sum triði maðurin á listanum hjá Sambandsflokkinum í Eysturoynni var tað nevnliga hann, sum skuldi taka við sessinum, um Alfred Olsen varð kosin til landsstýrismann í fiskimálum, soleiðis sum tosið annars var um.

Hetta hendi tó ikki, og síðani er kósin hjá Frithleifi snarað nakað. Hóskvøldið varð kósin snarað nakað, soleiðis at leiðin nú gongur niðan eftir Tinghúsvegnum og er sett beint móti nýggja bygninginum hjá Fótbóltssambandinum.

### Rituvíkingur

Á midnátt hóskvøldið var nevnliga greitt, at talan ikki verður um formansval uttan atkvøðugreiðslu á komandi FSF-aðalfundinum.

Alt kvøldið gingu telefonirnar millum fleiri feløg at kalla heitar, og at enda samdust B71, B68, KÍ og EB um, hvør teirra kandidatur til sessin skal verða.

Tað er greitt, at tá talan er um eina somikið skjóta reaktión, sum føroyski fótbóltsheimurin við hesum varð vitni til, so er talan um stóra misnøgd við tað, sum er farið fram seinastu dagarnar. Ikki minst tykist tað hava fest eld í málið, at Christian Andreasen, sum nú fer úr nevndini, og sum í fleiri ár hevur verið løgfrøðiligur ráðgevi hjá Fótbóltssambandinum, í gjár loysti fyri posabandinum.

Tað mundi av álvara seta gongd á tosið um, at

### Gott orð á sær

Frithleif Olsen er annars hampuliga ókendur innan føroyska fótbóltsheimin. Hann hevur annars havt sína gongd millum teirra, sum vara av NSÍ, men annars hevur tað verið á politiska og vinnuliga pallinum, at hann hevur gjørt mest um seg.

Fleiri setur var hann partur av býráðnum í Runavík, har hann tó ikki stillaði upp við seinasta býráðsval, og sum áður nevnt, so var hann eisini ein av annars fáu glottunum hjá Sambandsflokkinum við seinasta løgtingsval.

Á vinnuøkinum er hann einamest kendur gjøgnum fyritøkuna, FJM, sum hann var við til at stovna, og har hann í dag er stjóri. Serliga seinnu árini hevur fyritøkan verið í stórum vøkstri, og tað ber so eisini boð um eina góða leiðslu.

Hann ber orð fyri at vera ein siðiligur maður, sum tó kortini dugir at seta tingini upp á pláss, tá hetta er neyðugt, og ikki minst munnu leiðsluroyndir hansara vera nakað, sum hevur tiltalað teimum fýra formonnunum á Eiði, Sandi, Toftum og í Klaksvík.

### Størri enn politikkur

Enn er tað so ikki greitt, hvørt Frithleif Olsen verður næsti formaðurin í FSF, men tað tykist tó vera soleiðis, at hann hevur nakrar av teimum eginleikunum, sum formenn kring landið hava sóknast eftir.

Og verður hann tað, so tykist tað eisini greitt, at hann við hesm hevur lopið bukk upp um fleiri stig á politiska leikvøllinum, har hann annars tóktist vera ávegis.

Eitt nú sleppur hann at sita við síðuna av løgmanni á ólavsøku, og tað munnu tað ikki vera so nógvir tingmenn, sum sleppa, og sum onkur kanska vildi tikið til, so verður hann kanska máttmiklasti persónurin í landinum. Í øllum førum hjá teimum, sum seta fótbóltin oman fyri politiska leikpallin.



*Hermann Eysturoya, vinstrumegin, mátti ásanna, at Aritra Nandy framvegis dugir at stýra løttu badmintonbóltunum*

## Nýggj nøvn framat

**Tríggir favorittar góvu avboð, og so gjørdist tað heilt spennandi, tá Tórshavn Open varð hildin um vikuskiftið**

BADMINTON
*tiðindaskriv*

Tórshavn Open í Badminton varð hildin seinasta vikuskifti. Longu undan kappingini varð greitt,at hvørki Erland Poulsen, Bjartur Lamhauge ella Aksel Poulsen fóru at taka lut í kappingini, og so var at kalla púrasta opið, hvussu leikur skuldi fara.

Tað gjørdist venjarin hjá Badmintonsambandinum, Aritra Nandy, sum vann kappingina, og tó at hann í dag er plágaður av knæskaða, so sýndi hann týðiliga, hví hann einaferð taldist millum teir heilt stóru leikararnar í heiminum. Nummar tvey gjørdist Hermann Eysturoy úr HBF og Michael Gram úr MBF endaði á triðja plássinum.

Hjá kvinnunum fór Guri Poulsen úr HBF við sigrinum. Hon er annars í Danmark í lestrarørindum, men tað eydnaðist henni tó at koma heima til kappingina. Guðrun Jacobsen úr HBF gjørdist her nummar tvey.

Í kappingini hjá mansunglingum var tað ikki óvæntað Niclas Eysturoy úr HBF, sum vann ein tryggan sigur. Tað nýggja í hesum aldursbólkinum var, at Rógvi Poulsen úr HBF hesaferð fór fram um Hilmar Kass Jacobsen úr HBF og endaði næstfremst, meðan Hilmar sostatt bleiv nummar trý hesaferð.

Hjá kvinnunum undir 18 ár var Rannvá á Rógvu úr VÍF ikki við, og tað gav pláss fyri einum sigri til Jenny Nielsen. Ulla í Dávastovu bleiv nummar tvey. Tær báðar eru eisini úr VÍF. Nicola Gram, sum er dóttir formannin Michael Gram, bleiv nummar trý. Tað mest undrunarsama í hesum sambandi er tó, at landsins størsta badmintonfelag, HBF úr Havn, ikki hevur eina einastu gentu í hesum aldursbólkinum.

Landsliðið hevur ligið stilt aftan á Oyggjaleikirnar, men aftan á páskir fer liðið til Hetlands at vera við í einum mini-OyL í badminton, har átta landslið eru við. Tað eru hetlendingar sjálvir, sum hava bjóðað til hesa kappingina. Meiningin er millum annað at fyrireika seg til fyriskipanina av sjálvum Oyggjaleikunum, sum vera í Hetlandi næsta ár.